

Khurais-oljukeldan field liggur einar 160 kilometrar uttanfyri høvuðsstaðin í Saudi-Arabia, Riad. Mynd: EPA/ALI HAIDER

# OPEC roknar við at vit fara at brúka meir olju

**Jógvan Hugo Gardar**

08.11.2014 - 19:55

Oljan.fo

Meðan tey flestu á okkara leið tosa um at minka um oljunýtsluna og royna at finna aðrar orkukeldur, so eru felagsskapurin hjá 12 av heimsins oljuframleiðandi londum, OPEC, ikki í iva um at oljunýtslan kemur at økja munandi komandi tíggjuárini. OPEC-londini framleiða í dag umleið 40 prosent av allari olju í heiminum.

Metingin hjá OPEC sigur at oljunýtslan kemur at økja við 60 prosentum fram móti 2040. Fossil orka, ið serfrøðingar siga er ein av høvuðsorsøkunum til veðurlagsbroytingarnar, kemur framhaldadni at vera okkara týdningarmiklasta orkukelda.

Í síni ársfrágreiðing sigur OPEC at dagliga framleiðslan av olju kemur at vaksa úr 81,8 milliónir tunnum í dag til 99,6 milliónir tunnir í 2040.

Men at oljunýtslan økir, merkir tó ikki at oljan kemur at hava meir at siga, tí sum orkukelda kemur oljan at standa fyri 24,3 prosentum av orkunýtsluni í heiminum í 2040, samanborið við 31,9 prosentum í ár. Samlaði parturin av orkunýtsluni sum kemur frá øllum fossilum orkukeldum sum olju, kol og gass, kemur at minka úr 81,6 prosentum til 78,4 prosent.

Orkukeldur sum vindur, vatn, sól og aðrar burðardyggar orkukeldur fara at økja um sín part av orkunýtsluni úr 12,7 prosent í ár til 15,8 prosent í 2040. OPEC vísir á at orsøkin til at hesar keldurnar økja um sín part er at nógv lond geva stuðul til hesa framleiåsluna.

Kjarnorkan kemur at framleiða umleið seks prosent av orkutørvinum í heiminum í nógv ár framyvir